LM-072/2025

FYLGISKJAL 4

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 28.10.2025
Ummælistíð: 25.09.2025 til 28.10.2025
J. nr. (MEGD): 701-9-2025
J. nr. (HMR): 25/13185

Hoyringarskriv
til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið
(Berarakanning fyri fólk millum 18 og 45 ár og makar hjá berarum)

MEGD takkar fyri høvið at senda hoyringarskriv til nevnda uppskot

Uppskotið heimilar at *landsstýrisfólkið kann í samráði við Heilsustýrið og Sjúkrahúsverkið áseta reglur um, hvørjar ílegusjúkur tilboðið.*[1] Sambært serligu viðmerkingunum merkir hetta, at landsstýrisfólkið fer at kunna broyta listan yvir ílegusjúkur eitt nú um mett verður um viðkomandi ílegusjúkur *hava við sær, at børnini hava álvarslig likamlig brek.*[2] Etiska ráðið hevur viðmerkt um hetta evnið at: *frá millum øðrum einum brekrættinda-sjónarhorni er tað møguligt at liva eitt innihaldsríkt lív við eini álvarsligari arvaligari sjúku. Berarakanningar kunnu viðføra stigmatisering og mismuni mótivegis einstaklingum við breki. Etisk grundsjónarmið eru, sum leggja dent á týdningin av at fevna um menniskjaliga fjølbroytni og viðurkenna ikastið frá øllum einstaklingum til mannaættina.*[3] Tað er av alstórum týdningi at greina væl og virðiliga allar tær ílegusjúkur, ið við tíðini kunnu koma á listan. Hendan greining eigur at verða skipað við støði í allýsingini av brek-hugtakinum, sum er staðfest í altjóða brekrættindasáttmálanum, grein 1, samhildið við grein 5 í sama sáttmála, ið setur forboð móti mismuni vegna brek, m.a. í lógum, tænastum, átøkum, gransking og kanningum.[4]

Vinaliga vegna MEGD,

Ása Olsen
forkvinna

Bárður Atlason Ísheim
aðalskrivari

[1] Sí § 1 í uppskotinum um at skriva nýggja áseting, §6(b)(stk. 2), inn í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið.
[2] Sí serligu viðmerkingina til § 1, stykki 2, í uppskotinum á síðu 8.
[3] Sí skriv frá Etiska ráðnum um fyrimunir og vansar við berarakanningum frá 5. februar 2025. (https://www.facebook.com/etiskaradid.fo/posts/pfbid02weiCbBMTi72KwCbW3g94P6fkkHzyNLBEw4AgypZgJGbCWLZhqNdjaq4J3nXjEqNBl)
[4] Sí altjóða brekrættindasáttmálan smb. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2009 om FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo